Heilsa & lívsstílur

# Fólkaheilsan í



*Fólkaheilsuætlanin fevnir um: Vitan, fyribyrgjandi tiltøk, kostur, rørsla, royking og rúsdrekka og -evnismisnýtsla, sigur Hans Pauli Strøm*

**Tað verður stuttligari at vera føroyingur, tá vit eta sunnari, røra okkum meira og ikki roykja og drekka. Harumframt skulu vit hava fleiri og gjøllari upplýsingar um heilsustøðu føroyinga.**

HEILSA
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Hetta var høvuðsboðskapurin hjá Hans Paula Strøm, landsstýrismanni í almanna – og heilsumálum, tá hann í dag bjóðaði til kunnandi fund um fólkaheilsuætlanina.

Og landssstýrismaðurin greiddi frá, at fólkaheilsuætlanin skal betra um heilsustøðuna hjá føroyingum og betra um lívsgóðskuna í liviárunum og harvið eisini leingja um livitíðina.

Fólkaheilsuætlanin er í tveimum pørtum, har annar skal fáa til vega vitan um heilsustøðuna hjá føroyingum, meðan hin parturin snýr seg um at gera ítøkilig heilsufremjandi og sjúkufyribyrgjandi tiltøk. Hetta skal gerast við at raðfesta økini soleiðis: Vitan, fyribyrgjandi tiltøk, kostur, rørsla, royking og rúsdrekka og -evnismisnýtsla, greiddi lansstýrismaðurin frá.

Sambært Hans Paula Strøm, eru málsetningar orðaðir fyri, hvussu bøtast kann um heilsustøðuna, og mál eru sett, sum røkka fl eiri ár fram í tíðina. Í ætlanini verða vanligastu vandatættirnir og fólkasjúkurnar lýstar. Harumframt verður dentur lagdur á at fáa neyðuga vitan til vega og fáa vælvirkandi eftirlitsskipanir, sum skulu tryggja, at til ber at fylgja við gongdini viðvíkjandi heilsustøðuni, sjúku- og deyðatíttleika.

Tað var í 2004, at landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum setti ein arbeiðsbólk, at viðgera og koma við uppskotum til ein yvirskipaðan fólkaheilsupolitikk, ið snýr seg um bæði heilsufremjandi og sjúkufyribyrgjandi tiltøk.

Limirnir í arbeiðsbólkinum vóru:
*Hans Pauli Strøm*, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum
*Andor Ellefsen*, formaður í Kommunulæknafelag Føroya
*Bjarta Vilhelm*, leiðari á Heilsufrøðiskipanini
*Pál Weihe*, yvirlækni, Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu
*Høgni Debes Joensen*, landslækni
*Heðin Thomsen*, formaður í Fyribyrgingarráðnum
*Aibritt á Plógv*, aðalstjóri í Almanna- og heilsumálaráðnum
*Katrin Gaard*, fulltrúi í Almanna- og heilsumálaráðnum



## Vandar fyri fólkaheilsuna

- Royking
- Ov lítil rørsla
- Skeivur kostur
- Yvirvekt
- Rúsdrekka- og rúsevnismisnýtsla
- Arbeiðsumhvørvið
- Umhvørvisárin
- Vanlukku- og skaðaelvingar

## Fólkasjúkurnar eru:

- Sukursjúka (typa 2 diabetes)
- Krabbamein
- Hjarta-æðrasjúkur
- Beinbroyskni
- Sjúkur í rørslulagnum
- Ovurviðkvæmi
- Sálarlig líðing
- Roykjaralungu